**Bussførarar hjá bygdaleiðum eru í øðini um skuldsetingar frá løgregluni í útvarpinum í gjáramorgun um at teir bróta ferðslulógina í heilum og at teir ávara hvønn annan ímóti løgregluni**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bussførarar góðtaka ikki skuldsetingar frá løgregluni um, at tað er vanligt, at teir koyra ov skjótt. Teir taka sína ábyrgd í størsta álvara, men teir vænta eisini avgjørt, at løgreglan tekur sína ábyrgd í størsta álvara*

# Góðtaka ikki harða ákærur frá løgregluni

– Hatta eru ógvuliga harðar skuldsetingar.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni er ógvuliga ørkymlaður av skuldsetingini frá løgreglumanninum, Jan Fossaberg í útvarpinum í gjáramorgunin.

Í sendingini "Góðan morgun Føroyar" kom hann við skuldsetingum ímóti bussførarum hjá Bygdaleiðum, sum hevur gjørt nógvar bussførarar í øðini.

Samanumtikið segði hann, at tað var vanligt, at bussar hjá Bygdaleiðum koyra ov skjótt.

Men orsøkin til, at tað so sjálvdan eydnast løgregluni at taka bussførarar fyri at koyra ov skjótt, er, at teir ávara hvønn annan í telefonini um, hvar løgreglan er stødd.

Bussførarar, sum vit hava verið í sambandi við eftir skuldsetingarnar eru í øðini, tí teir vísa staðiliga aftur, at teir ikki vísa størstu ábyrgd í ferðsluni.

Serliga er tað fallið teimum fyri bróstið, at hesar skuldsetingarnar verða settar fram, nakrar fáar dagar eftir, at ein syrgilig ferðsluvanlukka, har ein bussur var uppi í, kravdi eitt mannalív.

Teir halda ,at hetta kann fáa fólk at gera sær ov bráðar niðurstøður um orsøkirnar til ta vanlukkuna.

## Taka ábyrgdina í fullum álvara

Kristan Davidsen, stjóri á Strandferðsluni og arbeiðsgevari hjá teimum, sum koyra fyri Bygdaleiðir, er eisini rættiliga ørkymlaður av skuldsetingunum.

– Hetta eru ógvuliga harðar ákærur, heldur hann.

Hann sigur, at eftir skuldsetingarnar frá løgreglumanninum í gjára-morgunin var ein kraftig reaktión frá teimum, sum koyra bussar.

Hann sigur, at bæði Strandferðslan og teir, sum eiga og teir, sum koyra bussarnar hjá Bygda-leiðum, taka sítt arbeiði í fullum álvara.

Hann sigur, at tað er prentað niður í teir, sum eiga bussarnar og teir, sum koyra bussarnar, at ferðslulógin skal haldast.

– Tað er tað ongin ivi um, at ferðslulógin skal haldast, tí hetta er eitt mál, sum vit taka í størsta álvara.

– Men vit vænta sanniliga eisini, at løgreglan ger sína skyldu og tekur sínar ábyrgd í størsta álvara, leggur hann afturat.

Hann leggur dent á, at er løgreglan varug við, at bussførarar ikki halda ferðslulógina, væntar hann avgjørt, at hon ger sína skyldu í tí sambandinum og fylgir málinum upp.

– Vit hava lagt stóran dent á, at hava góðar og tryggar bussar. Vit hava eisini lagt dent á, at hava góðar bussførarar og at teir hava trygdarskeið. Og sjálvsagt skulu teir eisini halda ferðslulógina.

– Halda teir ikki ferðslulógina, er tað eitt brot á sáttmálan og verður viðgjørt hareftir, leggur hann afturat.

Hvørjar avleiðingar tað hevði fingið fyri ein bussførara, er hann tó ikki førur fyri at siga nakað um í løtuni.

Hann leggur eisini dent á, at ferðaætlanin er løgd soleiðis, at tað ber til at halda ferðslulógina, men er ferðaætlanin ov trong, er tað ein trupulleiki, sum má takast upp.

Tað er kortini ikki hansara fatan, at ferðaætlanin er ov trong.

Tað er eisini hansara fatan, at bæði teir, sum eiga bussarnar og teir, sum koyra bussarnar, taka sína ábyrgd í fullum álvara.

Men nú hesir skuldsetingarnar verða settar fram, verður tað enn einaferða lagt bussførarum eina við at halda ferðslulógina.

# Matur kann broyta sinnalagið

**Lyndislagið hongur í stóran mun saman við tí, vit eta. Mangul upp á lívsneyðug føðsluevni kann elva til sinnalagsbroytingar. Tíverri hevur læknavísindin givið hesum lítlan ans. Men lukkutíð hava nógvir granskarar fingist við at kanna, hvussu sinnislagið er bundið at føðini, og dugnaligir kostráðgevarar hava við tíðini savnað stóra vitan og royndir á økinum. Hetta skrivar Carsten Vagn-Hansen, lækni og heilsuráðgevi, í danska heilsublaðnum, Naturli**

KOSTUR OG LYNDISLAG
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað eru fleiri orsøkir til, at børn gerast órólig og torfør, men í nógvum førum finst orsøkin í kostinum, tey fáa. Longu fyri 20 árum síðani, varð í Onglandi víst á, at mangul uppá lívsumráðandi feitar sýrur kundi vera ein faktorur, sum ger, at børn gerast ovuraktiv, oftast nevnt DAMP ella ADHD.

Longu í 1975 evnaði ein barnalækni í USA eina serstaka kostætlan fyri ovuraktiv børn, har ávís føðsluevni vórðu útihýst. Serliga vóru tað fruktir, sum innihalda náttúrligt evni, sum tarna umbroytingini av feitum sýrum. Henda kostætlanin vísti seg at minka um eyðkennini við ADHD.

So við og við eru víðfevnd prógv um, at vantandi goymsla og framleiðsla av lívsumráðandi feittsýrum er ein av størstu orsøkunum til eina røð av samanhangandi barnasjúkum, eitt nú orðblindni, astma og ovurviðkvæmi.

Tað er prógvað, at ovuraktiv børn hava eitt lægri innihald av sinki og jarni í blóðinum, landinum og hárinum. Eisini er prógvað, at fleiri evni, sum verða nýtt í góðgæti, lækka sinkið í blóðinum.

Í eini gransking eru royndir gjørdar við at geva børnum við ADHD ískoyti av sinki, jarni og selen, ella teimum lívsneyðugu feitu sýrunum.



*Børn við DAMP eru ofta ógvuliga viðkvom fyri stórum nøgdum av sukri. PET-skanningar vísa, at tey brenna ikki sukur nóg væl. Men vón er fyri hesum børnum, um tey fáa rætta føði og kostískoyti*

*Tilvildarlig mynd*

Nógv tann størsta broytingin sást hjá teimum børnum, sum fingu bæði mineralískoyti og feitar sýrur.

Ovuraktiv børn og børn við ADHD eru ofta ógvuliga viðkvom fyri stórum nøgdum av sukri. PET-skanningar vísa, at hesi børnini ikki brenna sukur nóg væl. Serstakliga tað reinsaða sukrið er stóri syndarin.

Carsten Vagn-Hansen er kendur, sum útvarpslækni. Hann hevur fleiri heimasíður um heilsu og kost; ein av teimum er www.radiodoktoren.dk



